# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fíggjarmálaráðið gongur ímóti Visión 2015

Í farnu viku kom út eitt pressuskriv frá Fíggjarmálaráðnum, har greitt verður frá nýggja lógaruppskotinum um skrásetingaravgjøld á bilum. Uppskotið er skorið eftir europeiskum leisti, og ein partur av skrásetingaravgjaldinum skal framyvir vera grundað á $CO_2$ útlátið. Hetta er gott, og Figgjarmálaráðið ger við hesum í tráð við politiska viljan um, at vit skulu uppfylla treytirnar í Kyoto avtaluni, og handlar harvið eisini í tráð við Visión 2015, tá tað kemur til umhvørvið. Fyri hetta hevur Fíggjarmálaráðið rós uppiborið.

Men, og her er eitt stórt men, sum heldur ivasamt, ikki verður nevnt í rættuliga ljósareyða pressuskrivinum. Fíggjarmálaráðið hevur skoytt eina lítla stramming uppí í mun til verandi lóggávu. Tað verður ikki gjørligt longur at hava ein bil við sær heim til Føroya sum flytigóðs. Hetta má man lesa noturnar til lógaruppsktið fyri at síggja. Hví vil Fíggjarmálaráðið avtaka henda møguleika? Er tað politiski viljin?

Tað tykist løgið at gera tað truplari at flyta heim til Føroyar í einari tíð, har politikarar kropp á kroppi standa og kæra sina neyð um allar teir mongu túsund útisetarnar, sum burdu komið heim aftur til Føroya. Visión 2015 gongur eisini út uppá at gera tað attraktivt hjá føroyingum at venda aftur til Føroya, og tað hjálpir hetta uppskotið ikki uppá. Heldur tvørturímóti. Fíggjarmálaráðið ger tað eitt lítið sindur meiri tvørligt at koma aftur, og tá skal sigast, at tað ikki júst eru tey stóru vælkomin skeltini, sum standa frammanundan.

At argumentera við, at soleiðis er í grannalondum, sum í sær sjálvum er ein heldur ópresis lýsing, sum ráðið ikki burdi sloppið avstað við at brúkt, er ikki nóg gott. Grannalond hava ikki eina nettofráflyting, sum vit hava, og grannalond hava ikki trupulleikar at tiltrekkja ung vælútbúgvin fólk. Tað hava vit, og tí má Føroya Landsstýri íroknað Fíggjarmálaráðið arbeiða fyri, at tað skal vera so ómakaleyst og innbjóðandi sum møguligt at koma aftur til Føroya hjá útisetum.

Tað kann væl vera, at tað er eitt smámál í mun til so nógv onnur, at fólk framyvir ikki sleppa at hava bilin við sær sum flytigóðs, tá tey flyta aftur til Føroya, men signalvirðið er ikki at taka feil av. Signalið er, at útisetar, um teir ditta sær at koma aftur til Føroya, kunnu vera vísir í, at Toll og Skatt stendur í smáum skóm og tekur ímóti teimum á keiini. Ikki í tráð við andan í Visión 2015.

**Sosialurin**

## Siðvenja at stýrimenn arbeiða seg upp at gerðast skiparar

**JOHN S. MYLLHAMAR**



So eydnaðist løgmanni í evstu løtu, áðrenn valskeiðið rennur út, enn einaferð at koyra ein landsstýrismann frá, uttan at kanna málið nærri. Hann lærdi einki av framferð síni móti Jóhan Dahl og Jógvani við Keldu. Hetta er vorðið ein óvani, hann hevur tikið sær fyri, til tess at bjarga sær sjálvum. Landsstýrismenn eru ofta leikmenn og gera tí einki, uttan fyrst at hava ráðført seg við løgfrøðingar í Tinganesi, og tá er spurningurin, hvør skal koyrast úr starvi. Slíkt kann skaða umdømi hjá landsstýrismanninum í framtíðini.

Viðvíkjandi málinum um Smyril er at siga, at vanlig siðvenja í øllum reiðaríum í verðini viðvíkjandi yvirmonnum, er framflyting, at stýrimaður við tíðini umborð flytir upp og gerst skipari (kapteinur). Alt annað er óhugsandi. Ta mannagongd átti ein stjóri á Strandferðsluni at kent. Annars hevur hann ikki førleika og evni at leiða slíkan stovn, og tá er náttúrligt at maðurin við evstu ábyrd, í hesum føri Jacob Vestergaard, má gera vart við seg.

Ivaleyst duga nýggir skiprarnar at stýra Smyrli, men tað er burturvið, at stýrimennirnar, sum ofta eisini avloysa sum skiparir umborð, og hava siglt túsundtalsferðir um Suðuroyarfjørð, ikki gerast eftirmenn, tá ið núverandi skiparar vegna aldur fara í land. Sjálvur havi eg kent ein av stýrimonnunum í meira enn tríati ár, og eg veit frá fólki, at hann er sera dugnaligur at handfara skipið (manøvrera) til og frá bryggju, og verður mettur at vera ein framúr góður siglari um Suðuroyarfjørð.

Hvør kann tá vera orsøkin til, at stýrimennirnir/avloysrarskiparnir, ikki verða settir í starv? Øvund, hevnisjúka, politikkur ella annað? Ódugnaskapur kann tað so ikki vera, tá ið mennirnir hava verið stýrimenn og skiparar bæði á undanfarna Smyrli og á hesum nýggja, Onkur er okkum eitt alment svar skildugur, tí stýrimennirnir mugu saman við fleiri av okkum, kenna mannagongdina sera margháttliga.

Annars haldi eg, at Strandferðslan hevur verið óheppin, í hvussu so er við tveimum av seinast stjórum. Annar situr nú í øðrum starvi, men leggur seg tó javnan alment út í arbeiðið á stovninum. Fyri stuttum eggjaði hann til hevndaratgerðir. Fyri at endurgeva hansara útsøgn: "Var eg stjóri á Strandferðsluni nú, so møtti eg ikki til arbeiðis í morgun". Slíkar útsagnir koma ikki frá fólki, ið hava ábyrdarkenslu.

Alt stríðið um Strandferðsluna og Smyril kann ikki vera annað enn sabotaga av stovninum, nú hann verður fluttur úr Havn til Suðuroyar.

Men rættvísin man sigra til endans.

## Skal hitt heilaga evangelium nøu eisini privatiserast?

Val



**TÓRBJØRN JACOBSEN**
Løgtingsmaður

Tað eru nú mong ár síðani, at Niels Juel Arge, sáli, valdi, at lata onkran av prestum okkara viðgera sunnudagstekstin í eini stuttari sending leygarkvøldið fyri, at guðstænasturnar vórðu hildnar í kirkjunum kring landið. Guðsjáttandi friðsemi yvir hesi sending hevur dámað mongum, og táið eg annars havi verið heima staddur, verður alt annað lagt niður, fyri at hoyra útleggingina, hetta seinasta árið, hjá hinum sera skilagóða glyvrapresti Meinhardi Bjartalíð.

Táið Flóvin hevur hálað teir seinastu harmonikutónarnar úr bjølginum og tey seinastu tíðindini eru farin aftur við borðinum, so hevur tað mær vitandi ikki sligið feil í fleiri tíggjutals ár, at ein av okkara pastorum trein inn á pallin og sendi eina kvøðu inn í hvørt heim í Føroyum við fyrivarninginum um, hvar roknast kundi við, at teir fóru at plasera seg í heilagu skriftunum á prædikustólunum dagin eftir.

Í kvøld varð alt øðrvísi. Táið Gunnar Skúvadal var liðugur við sína uppgávu, kom ein ókend kynsleys mansrødd til mikrofonina, og boðaði frá, at nú fór jammurin úr musikkmaskinuni at koyra fram til kirkjutíð í morgin. Hetta var óvæntað. Mundi hetta hava nakað samband við yvirtøkuna av Fólkakirkjuni, ella við innsetanina av nýggjum biskupi ella við uppáhildnu avkristnanina, sum ávísir bólkar í samfelagnum halda seg síggja í konturarnar á.

Meini so við. Sunnudagurin í morgin er hin seinasti í kirkjuárinum. Annar sunnudagur er harvið hin fyrsti í kirkjuárinum, vanliga nevndur fyrsti sunnudagur í advent. Ófatiligt at publicservice rásin, Kringvarp Føroya, við 70 milliónum tvangskravdum skattakrónum sum rakstrargrundarlagi, nú eisini hevur rationaliserað hesa sendingina burtur, eins og dastið av tí sum fólk tíma at lurta eftir.

Vágaði mær at ringja mín góða vin Meinhard Bjartalíð upp. Hann skilti heldur onki av hesum, tí hann hevði lisið evangeliið inn á stálband fyri fleiri døgum síðani. Gjørt sær stóran ómak, nú fyrra tekstarøðin endar, og farið verður inn í eitt nýtt kirkjuár annan sunnudag. Hartil hevði hann lagt hin óvanliga vakra sálmin, Nú hvítna tindar, hjá Roberti Joensen, sum meira er egin yrking enn týðing, inn í endan á sendingini.

Ímeðan størri og størri partur av sendiflatuni er vorðin tannleys tómgongd, og alt annars betong, teknikkur og bókhald, ætlar Mentamálaráðið at byggja uppí í Sortudýki fyri einar 52 milliónir av skattaborgaranna peningi. Ímeðan er Jón Brian Vidtfelt, sum einsmansherur, í holt við at útkonkurera alment goldnu rásina við sjeymílafetum. Alt fleiri fólk, eisini tey mest trúføstu ímóti Útvarpinum í hálvthundrað ár, eru nú farin at lurta eftir Rás 2 sum høvuðsrás. Kanska hevði tað verið eitt hugskot, at Hitt Heilaga Evangelium, varð privatiserað. Bjartalíð á Rás2 leygarkvøld kl. 21.50, ja, hví ikki tað? Neyvan er tað hugsandi, at Jan Múller fer at seta seg upp ímóti hesum, hóast hann ikki hevur lógligar heimildir at rættarsøkja sínar lurtarar, skuldu teir verið so gáloysnir ikki at goldið fyri lisensin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.